MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

Løgmansskrivstovan
Tinganes
100 Tórshavn

Tórshavn 29.01.2020
J. nr.
Viðgjørt: J. Christiansen
Tykkara j. nr.0617-010/18

Hoyringsskriv viðvíkjandi

Løgtingsmál nr. xx/201x: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin) (Landssvik og onnur brotsverk móti sjálvsavgerðarrætti og trygd Føroya fólks o.a., brotsverk ímóti stýrisskipanini og landsmyndugleikum føroyinganna, yvirgangur o.a., alvandasom brotsverk, ymsar gerðir, sum eru til skaða fyri almenningin, bidding og skaðiligt inntøkuvirksemi og brotsverk í familjuni). Uppskot til broyting í kap. 12, 13 og 20-23 .

MEGD tekur undir við, at revsilógin verður føroyskað og at dagføringar verða gjørdar. Tíbetur eru nógvar av støðunum, sum nevndar eru í revsilógini, so sum vápnað stríð fremmandar fyri okkum føroyingar, men um støðan uppstendur, vil MEGD vísa til grein 11 í ST-sáttmálanum, at Føroyar skulu taka øll neyðug stig til at tryggja fólki, ið bera brek, verju og trygd, tá ið tey eru stødd í vanda, eisini í vápnaðari ósemju, neyðstøðu í krígstíð, og tá ið nattúruvanlukkur henda.

Viðmerking til §117

Í samband við val, vil MEGD vísa á, at fólk við breki sjálvstøðugt kunnu greiða atkvøðu á valstaðnum ella við brævatkvøðu, so forðast kann fyri, at atkvøðan virkar øðrvísi enn ætlað (§117, stk 3). Tað merkir, at tað er atkoma fyri øll, óansæð um brekið viðvíkir sjón, hoyrn, lesiførleikum, flytføri ella annað. Vísandi til bóklingin *Tilgængelighed til valg FOR PERSONER MED FUNKTIONSNEDSÆTTELSE HVORDAN KOMMUNERNE SIKRER TILGÆNGELIGHED TIL VALG OG FOLKEAFSTEMNINGER:* https://valg.sim.dk/media/15679/tilgaengelighed-til-valg.pdf

§ 189. Tann, sum setir til sølu ella aðramáta roynir at fáa breitt út lutir sum heilivág ella sjúkufyribyrgjandi evni osfr.

Okkum er ikki greitt, hvørji fyribyrgingarevnir talan er um. Viðvíkjandi sølu av heilivági, hevur MEGD hesar viðmerkingar:

MEGD umboðar ein bólk av fólki við breki, sum vegna teirra limaliga, sálarliga, vitborna og/ella kensluliga brek eru viðkvom og kunnu taka óumhugsaðar avgerðir, og lættliga kunnu verða brúkt av teimum, sum vilja bróta lógina við sølu av ólógligum evnum. Tá er ein revsing á 6 ár ein stórur partur av ungdómsárunum, og eigur ein í metingini at hava brekini in mente, og umhugsni viðvíkjandi, hvørjar avleiðingarnar eitt fongsulsuppihald kann hava mótvegis møguligum viðgerðartilboði.

MEGD
Faroe Islands` Union for the Handicapped

§ 191 Euforiserandi evni

Hvørt ritalin (heilivágsviðgerð til fólk við ADHD) kemur undir euforiserandi evni og søla av ritalin fer fram í Føroyum sambært §191, kenna vit ongi tøl fyri. Men um so er, og persónurin í óumhugsni *"avhendir mongum"* slík evni, eru 10 ár í fongsli ein ógvuliga stórur partur av einum ungdómslívi. Hartil er spurningurin, hvussu nógv "mong" er. Tá vit ikki hava nøkur tøl, um tað verður gjørt og um talan er um "mong", ber so heldur ikki til at avvátta, at tað kann henda, men ábendingar eru um, at søla fer fram í DK og tølini eru høg í USA sambært Psykiatrisk tidsskrift 28.04.2017: https://medicinsktidsskrift.dk/behandlinger/psykiatri/710-misbrug-af-ritalin-vokser-markant.html).

Her er alneyðugt, at tann ungi við ADHD og hevur fingið ordinerað viðgerð við ritalin, verður væl kunnaður um viðgerðina og avleiðingar av misbrúki. Og at hann fær í boði sálarfrøðiliga viðgerð afturat heilivágnum, sum ger persónin føran fyri at meistra gerandisdagin.

MEGD vil vísa á ásetingar í ST-sáttmálanum, at **um** fólk, sum bera brek, gera seg sek í sølu av euforiserandi og doping evnum, so eiga tey at fáa javnbjóðis og munagóða lógarverju ímóti mismuni sama, hvør grundin er, og øll hóskandi stig eiga at takast, fyri at tryggja, at rímiligar tillagingar verða gjørdar (stk 3). MEGD vil vísa á týdningin, at borgarar, ið hava avbjóðingar á ein hvønn hátt, fáa hóskandi viðferð og at viðkomandi fakfólk verða boðsend, so tey í tilgongdini verða sædd, hoyrd og virð.

MEGD vil vísa á grein **13** í ST- sáttmálanum ***Atgongd til rættarskipanina***: Stk 2: Til tess at tryggja fólki, ið bera brek, at tey fáa brúkt rættarskipanina, skulu limalondini virka fyri, at tey, sum arbeiða í rættarfyrisitingini, harímillum løgregla og fongsulsstarvsfólk, fáa hóskandi uppvenjing í tí.

Vinaliga vegna MEGD

Tóra við Keldu, forkvinna

Jónvør Christiansen, aðalskrivari

Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
The Faroe Islands

Tel: +298 317373
Týsdag, mikudag og hósdag kl. 10 – 15
megd@megd.fo
www.megd.fo